# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg skilji ikki, at Tyler Peterson kundi fáa seg til at myrða tey. Hann var so vinarligur*

*(ung genta í Crandon)*

# Líkini verða brend í loyndum

**Hernaðarstýrið í Burma hevur fingið sær fleiri loynilig støð, har líkini av deyðum mótmælisfólkum og øðrum verða brend. Samdtundis verða munkar jagstraðir**



*Hernaðarstýrið jagstrar mynkar, sum verða lagdir undir at fjala vápn*

Ta seinastu vikuna hevur burmesiski herurin brent nógv lík á einari væl fjaldari og væl vardari brennistøð í landnyrðing úr Rangoon. Eygnavitni siga, at tær seinastu næturnar hava fleiri bilar hjá herinum koyrt aftur og fram ímillum ta almennu líkbrennistøðina í Rangonn og ta loyniligu í landnyrðing úr býnum.

Bretska blaðið The Sunday Times skrivaði í gjár frá tí, sum blaðið kallaði "álítandi keldur", at tíðindini um líkbrenningina eru eftir øllum at døma sonn.

Í Rangoon ganga fleiri ræðuligar søgur um framferðina hjá herinum. Eitt nú verður sagt, at fólk, sum høvdu fingið skaða í mótmælistiltøkunum, vórðu koyrd livandi inn í líkbrenniovnarnar. Útlendskir eygleiðarar í Burma siga seg hava hoyrt søgurnar, men teir duga ikki at siga, um hald er í teimum.

Fólk, sum búgva tætt við vegin norðan fyri Rangoon, siga, at óvanliga nógvir lastbilar hjá herinum hava verið at síggja har tær seinastu næturnar.

### Jagstra munkar

Blaðið The New Light of Myanmar, sum er málgagnið hjá hernaðarstýrinum, skrivar, at herurin hevur funnið skotvápn, lóður og knívar í fleiri av teimum kleystrunum, sum vóru miðsepil í mótmælistiltøkunum herfyri.

Blaðið ásannar, at herurin veit ikki, hvørjir munkar eiga vápnini, men at fleiri munkar eru tiknir í sambandi við rannsóknir í kleystrunum. Tað ljóðar eisini, at fleiri munkar hava latið seg úr tí eyðkenda munkabúnanum og eru flýddir úr kleystrunum, tí teir eru bangnir fyri at verða tiknir.

Ein kvinna, sum franska tíðindastovan AFP hevur tosað við, sigur, at hon hevur játtað at fjala tveir munkar, sum eru flýddir úr einum kleystri.

# 20 ára gamal løgreglumaður myrdi seks ungfólk

**Í lítla býnum Crandon í amerikanska statinum Wisconsin eru fólk skelkað, eftir at ein 20 ára gamal løgreglumaður myrdi seks ungfólk, sum hildu veitslu**

Tann 20 ára gamli løgreglumaðurin Tyler Peterson hevði frí, men miseydnaður kærleiki fekk hann at fara til hús eftir løgreglubyrsuni, og við henni myrdi hann seks ungfólk, teirra millum fyrrverandu unnustu sína. Tey seks, sum vóru í aldrinum 16 til 21 ár, vóru komin saman at halda veitslu.

Aftan á illgerðina flýddi Tyler Peterson, men tveir tímar seinni kunngjørdi Gary Bradley, borgaristjóri, at løgreglan hevði skotið hann, og at hann var deyður.

Tað búgva 2.000 fólk í Crandon. Mong teirra kendu Tyler Peterson, og tað fata ikki, at hann skuldi fáa seg til at fremja illgerðina.

- Hann var so vinarligur, og tað er ótrúligt, at hann skuldi finna upp á nakað slíkt, sigur ein ung genta við CNN.



*Tyler Peterson fór til hús eftir byrsuni og myrdi seks ungfólk*

## STUTT SAGT

### ST dregur mark

Tann ovasti dómstólurin hjá ST fer seinni í dag at seta mark ímillum tey bæði miðamerikonsku londini Honduras og Nikaragua. Londini hava leingi verið ósamd um, hvar markið eigur at vera, og ósemjan er í veruleikanum eitt stríð um góðar fiskileiðir og oljuleiðir nærhendis strondini. Bíðað verður við spenningi eftir úrskurðinum hjá ST, men bæði londini hava boðað frá, at tey fara at virða avgerðina hjá dómstólinum. Teir báðir forsetarnir skulu ætlandi hittast á markinum, at ST hevur ásett tað seinni í dag.

### Settu eld á bygd

Fyri nøkrum døgum síðani tók sudanski stjórnarherurin ræðið í lítla býnum Haskanita í landspartinum Darfur, men í gjár kunngjørdi ST-talsmaðurin í økinum, at onkur hevur sett eld á býin, og at umleið 15.000 fólk hava tikið til rýmingar haðani. Enn hevur ST ikki lagt ábyrgdina á nakran, men eygleiðarar ivast ikki í, at tað eru sudanskir stjórnarhermenn og teir illa kendu janjaweed-uppreistrarmenninir, sum hava sett eld á. Stríðið í Darfur hevur nú vart í fýra ár og hevur kostað 200.000 mannalív, og 2,5 mió. fólk eru rikin frá húsi og heimi.

### Ja til fríhandil

Í miðamerikanska landinum Costa Rica hevur ein meiriluti tikið undir við, at landið fær fríhandilsavtalu við hini miðamerikonsku londini og við USA. Á fólkaatkvøðu tóku 52 prosent undir við fríhandli, og 48 prosent vóru ímóti. Tey, sum eru ímóti, bera ótta fyri, at fríhandilin fer at forkoma teimum smáu fyritøkunum og landbúnaðinum. Hini siga, at júst smáfyritøkurnar og landbúnaðurin fáa gagn av fríhandlinum.